# Barnahjartað Jensina

**"Barnahjartafløga" er ein einføld "unplugged" útgáva, har Jensina møtir barnahjartanum niðri á jørðini uttan at distrahera við smartum ljóði og effektum, og har hon letur sína fantasifullu og lívsjáttandi forteljing við gittara í hond vera tað sentrala í útgávuni**




UMMÆLI
*Leivur Thomsen*



Fyri nøkrum mánaðum síðani gav Jensina Olsen út eina fløgu, sum ber heitið "Barnahjartafløga". Hetta er ein fløga við 15 sangum, sum Jensina sjálv hevur skrivað orð og løg til.

Sum heitið sigur, er hendan fløgan ætlað børnum - tó so, at ein sangur hevur verið at hoyra í umfari í útvarpinum. Tað er sangurin "Føðingardagsbamsan", sum er vorðin ein sonn landaplága, bæði fyri børn og vaksin. Tað má sigast at vera eitt heldur sjáldsamt fyribrigdi fyri barnasangir at koma í rotatónsskipanina hjá Kringvarpinum.

Onkran annan sang kenna vit aftur frá sjónvarpinum, so sum "Ding Dang Pappsang" og "Loyniliga Loynihurðin", sum ávikavíst eru tann fyrsti og síðsti sangurin á fløguni. Kringvarpið gav ta fløguna út í 2008.

Umframt at hava skrivað bæð orð og løg hevur Jensina sjálv gjørt húsan. Motivið er barnsligir fantasifigurar í reyðum og bláum, og tú ert onga løtu í iva um, hvønn málbólk, hendan fløgan er ætlað.

### Jensina multikunstnari

Jensinu kenna vit aftur frá mongum samanhangum. Hon er ein evnaríkur tónleikari, sangari, listamálari og sjónleikari. Hon syngur við í kórinum Mpiri, sum leggur seg eftir at framføra abstraktan klassiskan kórsang. Hon var eisini við í satiruræðini "E Elski Førjar", har hon hevði framúrskarandi leiklutin sum tann "pjattuta" danska mosturin. Hon hevur eisini gjørt vart við seg innan myndlist og hevur luttikið í ymsum framsýningum. Og so er tað hetta við børnunum. Jensina hevur áður latið úr hondum eina barnafløgu. Tað var Grísaflísa Pætur, sum kom út í 1999.

Hóast Jensina hevur spælt tónleik heilt frá barnsbeini, er hon heldur nýggj á føroyska tónleikapallinum. Tað var ikki fyrr enn í 2006, tá ið hon vann kapingina Ársins Songrødd, at hon veruliga kom fram í føroyska rampuljósið. Hetta var, sambært henni sjálvari, fyrstu ferð, hon hevði framført alment við egnum sangum og akkustiskum gittara - altso sum "singer/songwriter. Í hesum viðfangi gav hon í 2008 út fløguna "Eitt sindur av tí bláa", sum helst meira var til tann vaksna málbólkin.

Á nýggju barnafløguni brúkar Jensina allar sínar kompetansur, bæði sang, tónleik, sjónleik og myndlist.

### Einføld barnaútgáva

Børnini eru, sum nevnt, málbólkurin hjá hesari útgávu. So er spurningurin, hvussu Jensina røkkur tí málinum.

Vit leggja fyri við manningini. Jensina er í fronti í øllum sangunum við sínum gittara. Janus Kampmann hevur havt ein týðandi leiklut á fløguni. Umframt at spæla á guitar, dobro og steelguitar, hevur hann eisini staðið fyri upptøkum, ljóðblandi og framleiðslu.

Síðani eru tað Arnold Ludvig á bass, Pætur við Keldu á tangetum, Hans Petur í Brekkunum á saksofon og Finnur Hansen við harmoniku. Ein habil manning av royndum tónleikarum, sum vita, hvat tað snýr seg um. Jensina hevur her gjørt eitt tilvitað val við ikki at brúka trummusett. Út frá sangunum er tað væl skilligt, tí eitt trummusett leggur upp til størri produktiónir, og tá er vandi fyri, at nærleikin í hesi "hjartfaløguni" ikki kemur til sín rætt, um ljóðmyndin er ov pompøs og rúgvismikil.

Ljóðførini afturat Jensinu og gittaranum tæna mest sum effektir í tónleikinum. Kanska man kann halda, at tað er ov lítil variatión í arrangementunum, men tað er eyðsæð, at hetta valið er tilvitað, at Jensina hevur lagt seg eftir at gera eina "ærliga" fløgu við sær og sínum gittara í sentrum, og at dentur ikki hevur verið lagdur á at pakka sangirnar inn í tonsatungar pro tools produktiónir.

Eg haldi sjálvur, tað er frískligt í tíðarinnar meldri, at barnatónleikur kemur út, sum ikki er topptrimmaður og yvirgearaður við dance-rútmum og øllum møguligum space effektum. "Barnahjartafløga" er ein einføld "unplugged" útgáva, har Jensina møtir barnahjartanum niðri á jørðini uttan at distrahera við smartum ljóði og effektum, og har hon letur sína fantasifullu og lívsjáttandi forteljing við gittara í hond vera tað sentrala í útgávuni. Í so máta má sigast, at Jensina, við skapinum av hesi útgávuni, hevur rokkið málið og málbólkin.

### Einfaldir tekstir

Tekstirnir eru einfaldir við rímum og remsum. Eitt nú "Hokus pokus Filipp Tomm, dámdi væl at ganda, át um dagin hundrað bomm, hevði ringan anda" - og - "Au, au, mín tá, hon er blá, ein frensur hana traðkað á". Tekstirnir eru "fittir", kanska stundum banalir, og snúgva seg um bamsur, kovboyar og blómubilar - fyri tað mesta settir upp í ørindi við fýra reglum við rími á aðru hvørjari reglu. Jensina megnar við sínari nærveru at geva teimum lív, so ein onnur dimensión uppstendur, nevniliga tað at vera saman um tónleikin -